# Fantastiska stuttligt at síggja stóru spæligleðina

**Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, sum nú eisini hevur Skála og Skálafjørð undir sínum "hatti", heldur, at bygdirnar á vestara armi á Skálafjørðinum hava havt eitt fyrimyndarliga gott og gagnligt samstarv við ítróttini, har skálamenn hava havt fótbóltin í summarhálvuni og strandingar hondbóltin í vetrarhálvuni**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta sunnudag var Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, saman við nógvum viðhaldsfólkum hjá Nes sóknar Ítróttarfelag til fótbóltsdyst á Skála millum Skála og NSÍ í bestu deildini.

Eftir at NSÍ var komið á odda stutt eftir, at dysturin var byrjaður, tóku skálamenn seg rættiliga um reiggj og helmaðu ikki í, fyrr enn teir vóru á odda, 3-1, sum eisini gjørdist úrslitið av dystinum.

Vit spurdu Rodmund, hvussu tað kendist at vera borgarstjóri í Runavíkar kommunu, sum nú eisini fevnir um Skála og Skálafjørð, at síggja skálamenn soleiðis syfta liðið í gomlu kommununi og fara avstað við øllum trimum stigunum.

- Skálamenn hava eitt gott fótbóltslið, og haldi tað vera ótrúliga væl klárað av teimum nú enn einaferð at hava lagt seg á odda í bestu deildini. Skála er eitt lutfalsliga nýtt lið í føroyskum topp-fótbólti, og tað er fantastiska stuttligt at síggja, hvussu stór spæligleðin og ágrýtni er.

Rodmundur vísir á, at NSÍ liggur soleiðis onkustaðni í miðjuni í deildini, og hann vónar sjálvsagt, at felagið fer at megna at hála seg uppeftir stigatalvuni, soleiðis sum kappingarárið líður.



*Býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen, sá sítt "egna" lið tapa ímóti "sínum" nýggja 1. deildarliði sunnudagin, tá ið hann var til fótbóltsdyst á Skála, sum nú eisini er partur av Runavíkar kommunu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Fyrimyndarligt samstarv

Borgarstjórin í Runavíkar kommunu heldur, at bygdirnar á vestara armi á Skálafjørðinum, Skála og Strendur, hava havt eitt fyrimyndarliga gott og gagnligt samstarv við ítróttini, har skálamenn hava havt fótbóltin í summarhálvuni og strandingar hondbóltin í vetrarhálvuni.

- Hetta eru tvær miðalstórar bygdir, og eg haldi meg ikki taka munnin ov fullan, tá ið eg sigi, at hetta samstarv hevur havt veldiga stóran og sosialan týdning fyri báðar bygdirnar á vestara armi.

Rodmundur sigur seg vóna, at hetta skilagóða og positiva samstarv fer at halda fram – eisini, nú Skála og Skálafjørður eru vorðin partur av Runavíkar kommunu.

- Tað hevur verið soleiðis í mong ár, at kommunumørkini ikki hava órógvað ítróttarliga samstarvið, og eg vóni, at bygdirnar eisini framhaldandi fara at samstarva um røsku og ágrýtnu ítróttarfólkini, tí hetta gevur teimum eina velduga styrki.

### Góðar stuðlar

Rodmundur vísir á, at tey úrslit, sum Skála í fótbólti og StÍF í hondbólti hava nátt, eru ikki komin av sær sjálvum.

- Aftanfyri tað arbeiði og tær dygdir, sum vit síggja á vøllinum hjá hesum báðum feløgum, liggur eitt stórt arbeiði – og nógvir og góðir og trúgvir stuðlar.

Sama var, vísir borgarstjórin á, tá ið Skálabáturin í sínari tíð var í hæddini í kappróðri.

- Tað gongur altíð upp og niður í ítrótti, men sum eg havi skilt, ætla skálafólk sær at fáa meira lív í aftur kappróðurin, og tað gleða vit okkum til, sigur borgarstjórin, Rodmundur Nielsen.

# Skála og TB dystast á Fjarðastevnu

**Skála noyðist at vinna, um liðið skal halda seg í oddinum, og TB skal ikki tapa, um liðið skal halda seg leyst av botninum**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Fjarðastevnu verður nógvur fótbóltur, nú stevnan á fyrsta sinni verður hildin á Skála.

Umframt hópin av barnadystum og dystum í yngru deildunum, sum byrja longu mikudagin og halda fram hósdagin og fríggjadagin, verður tann stóri dysturin sunnudagin klokkan 15, tá ið Skála og TB bresta saman í bestu deildini.

Dysturin millum Skála og TB hevur stóran týdning fyri bæði liðini. Skála, sum nú liggur á odda í 1. deild, skal helst vinna, um liðið skal varðveita leiðsluna – og TB hevur ikki ráð at tapa, um liðið skal halda seg leyst av botninum.

Skála og TB hava spælt ein annan dyst í hesum kappingarárinum. Hesin varð eisini leiktur á Skála, og tá vann heimaliðið við fimm málum móti einum. Men TB kann saktans bíta frá sær; tað hava teir víst fleiri ferðir í ár. Tí kann væntast, at landskappingardysturin sunnudagin verður spennandi.

Dysturin millum Skála og TB í 1. deild verður samstundis steypadystur, og gevari av steypinum er Gunnleif Djurhuus.

Leggjast kann aftrat, at allir dystirnir um stevnuna vera steypadystir, og tað er Skála Arbeiðsmannafelag, sum saman við Skála Ítróttarfelag letur steyp og/ella heiðursmerkir.

# Skjóta brotsspørk á Fjarðastevnu…

**Børnini sleppa at royna seg fríggjadagin - og tey vaksnu sunnudagin**

Umframt mongu steypadystirnar, sum verða í yngru deildunum á Fjarðastevnu – og landskappingar- og steypadystin í bestu deildini millum Skála og TB, verður eisini skipað fyri áhugaverdari brotssparkskapping á fótbóltsvøllinum.

Fríggjadagin klokkan 18 sleppa børnini at royna seg, og sunnudagin – eisini klokkan 18 – verða tað tey vaksnu, sum sleppa at vísa, hvussu væl tey duga at skjóta brotsspark.

Nú Skála liggur fremst í bestu deildini, vænta fyrireikararnir av Fjarðastevnuni, at mong – bæði børn og vaksin – fara at royna seg í hesi kapping.

**-v.**



*Nú kunnu børn og vaksin "spíska" sær fótbóltsskógvarnar til brotssparkskappingina á Skála*